LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

FORD ESCORT VAN 7S 1.8
til sølu, árg. 2000, bert koyrt 4500 km, er sum nýggjur. Kr. 69.500,-
Tlf. 211655

OPEL ASCONA
Árg. 87 til sølu. Vælegnaður sum eykalutir. Eisini fáast aðrir deilir, somuleiðis til Opel Ascona.
Tlf. 229633 (Nolli)

BILUR TIL SØLU
Bilur við ongum plátum til sølu. Ein Peugeot 306 S16, koyrt 145.000 km, 8 ár. Nýggjar sportfelgur og dekk. Toppakningur skiftur í ár.
Tlf. 263680

FORD SIERRA TIL SØLU
Ein vínreyður Ford Sierra 2.0i við motorskaða, árg. 91, sær sera gott út, alu sportfelgur fylgja við. Ringið og hoyri nærri, til sølu fyri 7.000,-
Tlf. 371291

FORD ESCORT 1.6
16V til sølu, árg. 10/94, koyrt 128.000 km, svartur metl. el-rútar framman, centrallás, hita í setrum framman. Bilurin er í sera góðum standi og sær sera gott út. Pikadekk kunnu fylgja við.
Tlf. 214634/421688

TOYOTA CAMRY 1.8
sær gott út, koyrt 135.000 km, prísuppskot 20.000 kr.
Tlf. 270953

TOYOTA COROLLA 2.0 DXL
Árg. 97 til sølu.
Tlf. 228514

FORD KA TIL SØLU
Árg. 1997, 100.000 km, 4 summardekk umframt vetrardekkini, sum eru á, radio við cd-avspælara, airbag, tectylviðgjørdur, selist vegna familjuøking. Bert 40.000,-
Ring 322120 ella 522120

SUMMARDEKK
2 Yokohama 175/65 R14, lítið brúkt, til sølu.
Tlf. 211863

FORD SPORTFELGUR
originalar sportfelgur til Ford Fiesta til sølu.
Tlf. 210132

FORD SCORPIO 2.5 TD SEDAN
Árg. 91 til sølu. Bilurin er silvurgráur, hevur tokulyktir, alufelgur, el-rútar fr., el-spegl við varma, sóltak og fløgspælara. Sýnaður des. 03.
Áhugað ring 268650

VIÐFESTISVOGNUR
Kvik trailer 500 kg. við dúki og nasahjóli, ongantið brúktur. Til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 741225 eftir kl. 17

TIL SØLU
eru 4 stk. lítið brúkt Goodyear summardekk stødd 165 x 13","Tlf. 775556

FELGUR
Fýra 12" felgur v/ summardekkum, passa til Suzuki Carrier, biliga til sølu.
Tlf. 422343/722343

BILUR TIL SØLU
Ein Volkswagen Passat 32, árg. 87, nýsýnaður, er í góðum standi, til sølu fyri 13.000 kr.
Tlf. 741225 eftir kl. 17

BÍLIGA TIL SØLU
Ein gráur Opel Ascona 1.6 árg. 87.
Tlf. 322271 eftir kl. 17

FORD FOCUS TREND 1.6i
svartur, sportfelgur, sportsetur, hita í setrinum, el rútar fr. tuningsútstoyt, cd-spælara, bíliga til sølu, sera biliga!
Tlf. 261595

KIA SEPHIA TIL SØLU
Árg. 98, 77.000 km, til sølu fyri 45.000 kr.
Tlf. 229735/580004/448167

TIL SØLU
Sportfelgur av merkinum Venom PSV, hava verði brúktar til Carina E. Stødd: 17" Breidd 7,5" Prísur 4000 kr.
tlf. 282323

GÓÐUR BRÚKTUR
Góður brúktur gearkassi til Suzuki Baleno 1300, árg. 99, yskist biliga til keyps.
Tlf. 320470/270705

HEILÁRSDEKK
4 Ceat heilársdekk til sølu. Stødd. 185/75 R14 C 102/100 P 8PR.
Ring 225159

TIL SØLU
Summardekk 205/50-15" til sølu.
Tlf. 222233

FORD FIESTA 1,8 DIESEL
frá 1992 til sølu. Bilurin hevur koyrt 146.000 km og er í góðum standi.
Tlf. 310721 ella 215721

MAZDA 6 TIL SØLU
14.000 km, 10 mør. gamal, 170 HK, leðurinntrekk.
Tlf. 212779

FORD FIESTA
árg. 90, nýsýnaður, bíliga til sølu.
Tlf. 252841

TOYOTA CARINA II
árg. 88 í góðum standi, nýsýnaður, bíliga til sølu.
Tlf. 361803

TIL SØLU
Volvo 240 GL sedan, árg. 87, kører dagligt, pæn, alufælge + mange reservedele medfølger. Skal synes. Sælges p.g.a. flytning til Danmark. Pris ide 6.500 kr.
Tlf. 373372, Sørin 229482, arb.

HONDA CIVIC 1.4i
árg. 97, 97.000 km, powerstýring, el-rútar og -spegl, stereo við mp3 spælara, í sera góðum standi. Til sølu fyri 68.000 kr.
Tlf. 218980/228880

BMW 520i TIL SØLU
Bilurin er frá nov. 91, hevur el-sóltak og sleipikrók, anlegg við fjarstýring. Nýggir pyntilistar og pikadekk fylgja við.
Tlf. 317570

TIL SØLU
Viðfariskassi og takhaldarar, bíliga til sølu.
Tlf. 317905/211631

TOYOTA COROLLA 1.8 DIESEL
árg. 89, nýsýnaður í góðum standi, summardekk og bilstereo, til sølu fyri 17.500,-
Tlf. 265615

TOYOTA COROLLA DIESEL
st.car, árg. 94 til sølu sum eykalutir. Motorurin í lagi. Prísur: 9.500 kr.
Tlf. 260813

DAEWOO NUBIRA 2.0
Daewoo Nubira 2,0 st.car. árg. 2002, leðursetur, fløguspælari, aircon., klimaannlegg, el-rútar, sentrallás, sportfelgur.
Tlf. 218980

SUMMARDEKK
4 summardekk stødd 175/65-14 lítið brúkt til sølu fyri 1/2 pris.
Tlf. 310592

SUM NÝGGJUR
Reyður Honda Accord 1.8i árg. 98, 83.000 km, nýsýnaður, cd-spælara, centr. lás o.a. Sum nýggjur, ein eigara. Prísuppskot kr. 89.000,-
Tlf. 243445 ella 421787

CITROEN XARA 1.9 TD
árg. des. 1998 til sølu. Bilurin hevur koyrt 137.000 km og er í sera góðum standi. Til sølu fyri hægstbjóðandi.
Tlf. 507039 ella 324796

TIL SØLU
Brenderup viðfestisvognur, 13" hjól, lastar 400 kg. Lastin er úr stáli og er 94 x 146 cm. til stoddar. Vognurin er nýggjur og fingin sum vinningur. Virðið er 6-7.000 kr. Til sølu fyri 4.500,-
Tlf. 251144

CITROEN XANTIA 1.9 TD
árg. 10/95, km 126.000, sýnaður 24.9.03, nýggj pikadekk og dekk á felgum + takboylar, nýggja kamreim og kølivatn pumpu, rustviðgjørdur, el rútar framman, bíliga til sølu.
Tlf. 228021

SPORTFELGUR
Einar 15" sportfelgur við 2 góðum dekkum til ein Toyota Carina E til sølu fyri einans 3.000 kr.
Tlf. 222401

NISSAN PATROL 3.2
(longra modellið) árg. 87 til sølu.
Tlf. 262275

OPEL ASTRA 1.6 TIL SØLU
árg. 98, sær sera gott út, 70.000 km, sýnaður februar 2004, kr. 85.000,-
Tlf. 572744

MAZDA 323
árg. 12/87, koyrt 178.000 til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 220607

BMW TIL SØLU
BMW 320D 167 HK, 4 1/2 ár.
Tlf. 223311/315511

JEEPUR TIL SØLU
Mitsubishi Pajero, langur, við setrum aftan, árg. 89, nýsýnaður.
Tlf. 223311/315511

TIL SØLU
Toyota Corolla EE80 1.3 árg. 1986.
Tlf. 441525/448389

SUMMARDEKK TIL SØLU
4 summardekk bíliga til sølu.
Stødd: 215/55-R16.
Tlf. 228125

MAZDA 626 GC! TIL SØLU
árg. 89, til sølu fyri 4.000,- Bilurin krevur smáar bøtur. Bilurin hevur 2.0 motor.
Tlf. 253046

FIAT STILO SPORT TIL SØLU
1.8 133 HK árg. mai 2002, 17" felgur, 27.000 km. Bilurin er í sera góðum standi. Um hóskandi boð fæst.
Tlf. 222355

SPORTFELGUR
Orginalar Ford sportfelgur 15" til sølu fyri 3000 kr.
Tlf. 587492

HONDA TIL SØLU
TRX 450 FE Fourtrax 4x4 hjulstrekt súkkla. 433cc (17,8 kw) elskift gear og elskift 2 og 4 hjulstrekk.
Tlf. 506553

Amboð

PLENUKLIPPARI
til sølu fyri 200,-
tlf. 312915 eftir kl. 18

STILLADS
Stillads til leigu.
Ring 441614 eftir kl. 17

Arbeiði

BROTFLÍSAR
Tilboð ynskist upp á at leggja nakrar brotflísar.
Tlf. 448271

MANGLAR TÚ ONKRAN
at gera reint fyri teg nú summarið er í honum. 38 ára gomul kvinna átekur sær at gera reint fyri fólk í Havnini. Ring og hoyr nærri
tlf. 509336

SEYMING
Eg átaki mær alla vanliga seyming, umvæling, upplegg o.a. Eisini før. búna.
Tlf. 423744/251363

TILBOÐ YNSKIST
Er tað nakar, sum kann átaka sær at skifta tak á einum sethúsum í Streymnesi. Tilboð ynskist.
Tlf. 422358

TILKOMIN MAÐUR
átekur sær havarøkt, so sum lúking, klipping av grasi o.a. Er vælgjørdur og sámuligur í prísi.
Tlf. 319364/267233

HEY HEY
Eg eri ein 13 ára gomul genta, sum søki arbeiði. T.d. gera reint, ansa børnum, ganga ørindi. Altið áhuga aftaná skúlatíð. Vinarliga ring, tann sum hevur áhuga.
Tlf. 310232/263220

ROYNDUR
lastbila- og trailarførara søkir arbeiði. Yvirtíð eingin forðing.
Tlf. 224417

TILBOÐ YNSKIST
Er tað nakar sum kann átaka sær at mála eini hús, tilboð ynskist.
Telefon 317362

Barnaansing

KONA/GENTA SØKIST
at ansa eftur tveimum børnum frá 9.00-16.00 frá fyrsta juni til hálvan juli.
Tlf. 314874/215274

Barnaútgerð

KOMBIVOGNUR
við góðum koyriposa og uppreiddari lift til sølu. Puslitaska og eyka madrassa fylgja eisini við.
Tlf. 210382

BRIO KOYRISTÓLUR
Grønur Brio koyristólur til sølu fyri 1.700 kr. (Kostar nýggjur 3.500). Bert brúktur til eitt barn.
Tlf. 218072

KOYRISTÓLUR
Ein Odder koyristólur ið er 4 ár, kurv, termomadrassa, ullintur soviposi v/ reimum, regnslagi og neti, vælhildin, til sølu fyri 1200 kr.
Tlf. 215353

TIL SØLU
Svartur Simo Bertini koyristólur við posa, regnslagi og fluguneti. Vognurin hevur lufthjól, sum kunnu venda. Eisini selja vit eitt Brio pusliborð at hanga upp á veggin.
Tlf. 457660/217660

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Svartur Simo barnavognur við alustelli og -lufthjólum til sølu fyri 3.500 kr. Dýna, koddi og seli fylgja við.
Tlf. 318823

KOMBIVOGNUR
Ein vælhildin Simo kombivognur við lift, madrassu og lufthjólum til sølu fyri 3.000 kr. Áhugað ringið
tlf. 251677 ella 457770

Bátaútgerð

ARAMIS 30 FÓT TIL SØLU
Báturin hevur fiskiloyvi, snellur, 175 HK motor, lit ekkolodd og VHF. Prísur 270.000,- við mvg.
www.bat.fo
Tlf. 213800

STIGFJORD 28 TIL SØLU
Klárur til fiskarí við fiskiloyvi, snellum og línuspæli. Annar bátur kann ganga inn í handilin. Sámuligur prísur. www.bat.fo
Tlf. 213800

VOLVO PENTA
Tamd 31A bátamotorur til sølu.
Tlf. 211027

JOLLA
Glasfipur jolla til sølu. L. 495 b. 180.
Tlf. 252453

YNSKIST
Radari ella display, Kelvin Hughes fisherman. 16 fjórðingar.
Tlf. 283832

FISKILOYVI
Føroya Banka bólkur 4A til sølu.
Tlf. 580142

EGNINGARTRAKT
ynskist til keyps.
Tlf. 229080

LÍNUSPÆL
1 línuspæl til sølu.
Tlf. 371681

BÁTAMOTORUR
ynskist til keyps. Alt yvir 200 HK hevur áhuga.
Tlf. 220512

TIL SØLU
13 føtur glasfipurjolla v/ bátavogni (nýsýnaður) í sera góðum standi. Uttan motor. Kann eisini seljast hvørt sær. Um hóskandi boð fæst.
Tlf. 252829/263644

BÁTUR TIL SØLU
Ein Aqua star 33 til sølu. Hevur alla útgerð, max. ferð 14 mil. Klárur bæði til línu og snellu, verður seldur við fiskiloyvi fyri 550.000 kr.
Tlf. 333028/282499/288499

EIN SKRÚVA
við trimum bløðum og ein 30 mm aksil, ið er 2 m langur bíliga til sølu. Deilirnir hava staðið í einum 10 mannafari við 36 HK Volvo Penta motori.
Tlf. 220603

PÁHANGSMOTORUR YNSKIST
Hevur tú ein páhangsmotor standandi, so eri eg áhugaður. Alt hevur áhuga.
Tlf. 268584/371887

FISKILOYVIR
Vit hava fiskiloyvir í bólki 4A og 4B til sølu.
Tlf. 312238

YNSKIST TIL KEYPS
Brúkt lína hóskandi til gogguglúpar ynskist til keyps.
Tlf. 509077

PÁHANGARI
Mariner páhangari 6 HK 2 cyl. til sølu.
Tlf. 441017/741017

GLASFIPUR
jolla v/ dupultum botni til sølu 4,4 m.
Tlf. 441017/741017

37 FÓT GLASTREVJABÁTUR
við fiskiloyvi 5A og nógvari útgerð, til sølu, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 215813

Bingo

EYDNUHJÓLIÐ
hjá Leirvíkar Ítróttarfelag verður í Fimleikarhøll skúlans, leygarkvøldið 8. mai kl. 19.30.
LÍF

FRÁ 7C Í GLYVRA SKÚLA
Loppumarknaður, tombola og kaffisøla verða á Torginum uttanfyri býráðshúsið í samband við langan leygardag í Runavík.
7C

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu mánakvøldið 10/05 kl. 19. Nógvir góðir vinningar. M.a. full pláta 400 kr. Á lutaseðlinum m.a. gávukort á 2500 kr. frá Smyril Line. Drigið verður millum spølini. Eykaspæl. Koyring heim aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Spastikarafelagið

SUÐUROYAR NORÐARA DANSIFELAG
Gott bingo verður í høllini mánadagin 24. mai kl. 19. Hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
Nevndin

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði leygardagin 8. mai kl. 19.
Eldrafelagið Borgin

Bøkur

SKALT TÚ Á FHS?
Leitar tú eftir brúktum bókum til FHS, ið seljast bíliga, so ring til mín!
Helena 220409 innan 20. mai

Burturm. /funnið

SVØRT LEÐUR,
akslastaska »Bössetaske"«, á stødd við eina bók, 4 lummar, burturmist antin umborð á Dúgvuni ella (í bilinum) uttanfyri ítróttarhøllina á Skála. Innihald: Heilivágur, lyklar, pípa v. tubbaki, úttókukort til sparikassa o.a. Um tú hevur funnið taskuna, vinarliga
ring: 225263

HYGG HER!
Pengar eru funnir uttan fyri Sparikassan í Hornabø 20.04.04. Um tú hevur mist pengarnar, so ring
tlf. 351710

TANN SUM AV
misgáum hevur tikið mína peningamappu leygardagin 1. mai í Toystovuni í Vági, vinarliga gev mær hana aftur, týdningarmikil pappír eru í. Finningarlørn verður givin.
Tlf. 373395

BRILLUR
Hevur nakar funnið mínar svørtu brillur sum eg misti burtur í eysturbýnum um miðjan apríl.
Tlf. 317990/517990 Tummas

HYGG HER!
Hevur nakar sæð mína súkklu, sum bleiv vekk á Rituvíkshálsi tann 17. apríl. Tað er ein hvít/pink Rocky súkkla, hon er til 10-12 ár.
Tlf. 447547/507322

Býli

ÍBÚÐ YNSKIST Í EYSTUROYNNI
skjótast gjørligt. Fari væl um og gjaldi til tíðina. Hava tit eina at leiga mær kunnu tygum ringja
Tlf. 226540

HJÚN
Hjún við 2-ára gamlari dóttur ynskja íbúð/hús til leigu í høvuðsstaðarøkinum frá juli ella august. Fara væl um og roykja ikki.
Anna og John Eystberg, tlf. 32969829/28294405

STÓR ÍBÚÐ Í TÓRSHAVN
Stór íbúð í Tórshavn til leigu fyri kr. 5.500 um mør. + ljós og varma. Sera gott útsýni.
ibudtorshavn@hotmail.com

ÍBÚÐ YNSKIST TIL LEIGU
Par við 2 børnum ynskir íbúð ella hús til leigu í Havn.
Tlf. 251303/222955

HÚS Í RITUVÍK
Eini hús til leigu í Rituvík.
Tlf. 267544

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Ungt par søkir íbúð í KBH. Alt hevur áhuga. Gjalda til tíðina. Roykja ikki, hava fast arbeiði.
Tlf. 0045 50546359 Jóhann, 244443 Randi

HÚS Í HAVN YNSKJAST TIL LEIGU
Vit eru ein familja við 2 børnum. Alt hevur áhuga.
Tlf. 314874/215274

HÚS YNSKJAST TIL KEYPS ELLA LEIGU
Vit eru ein familja við 2 hálvaksnum børnum, ið ynskja eini hús í Hoyvík til keyps ella leigu. Vit hava bæði fast arbeiði, og hevur hetta skund, tá ið vit eru uttan bústað fyrst í juni.
Vinarliga ring tlf. 214133

ÍBÚÐ SØKIST
Kvinna søkir íbúð í Havn. Alt hevur áhuga.
Ring 270589/318580

SETHÚS Í VESTMANNA
til sølu. Eldri sethús í Vestmanna til sølu um hóskandi boð fæst. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 424792

ÍBÚÐ SØKIST
Einlig mamma við tveimum børnum, 6 og 11 ára gomul, søkir íbúð í Tórshavn. Havi fingið læruplass í býnum og skal byrja tann 2. august. Royki og drekki ikki, fari væl um og gjaldi til tíðina.
Tlf. 445068

ÍBÚÐ YNSKIST Í KBH
Friðarlig hjún – roykja ikki – við 6 mør. gomlum barni søkja 3 rúms íbúð á minimum 60 kvadratmetrar í Keypmannahavn, helst nærhendis Ballerup. Leigumálið skal verða til min. januar 2008. Kunnu flyta inn beinanvegin.
Áhugað ringi tlf. 32553411 ella 25622944

KAMAR TIL LEIGU
í Vesturbýnum við atgongd til køk, bað og vaskimaskinu.
Tlf. 221158/313799

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt par søkir íbúð í Havn frá 1. aug. 2004. Fara væl um og gjalda til tíðina. Kostnaður max. 4.000,- um mánaðin.
Tlf. 264462

BÝTA UM ÍBÚÐ?
Íbúð í innara KBH ynskist í býti við íbúð mitt í býnum í Tórshavn. Vit eru eitt par, ið ætla okkum at vera burtur frá 3. juli og 5 vikur fram. Hevur hetta áhuga, vinarliga ringið
316103/218250 ella 225972

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Íbúð til leigu á Eysturbrúgv í juli mánaðar til ferðandi.
Tlf. 39272536/26252536

ÍBÚÐ SØKIST
Eg eri ein 21 ára gomul genta, ið søki íbúð, drekki, royki ikki. Havi fast starv, fari væl um og gjaldi til tíðina.
Tlf. 227092

ELDRI HÚS
ynskjast til keyps í Suðurstreymi, max. 700.000 kr.
Tlf. 270494

YNSKIST TIL KEYPS
Hús á Tvøroyri ynskjast til keyps. Vit eru ein familja við 2 børnum. Alt hevur áhuga.
Tlf. 372045

SKALT TÚ TIL HAVNAR
og vil búgva væl, so er møblerað íbúð til leigu, 112 fermetrar við øllum heintleikum, vikuskifti ella styttri tíð. 700 kr. um dagin, seingjarklæðir 50 kr.
Tlf. 218664

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Søknast verður eftir íbúð til framleigu í København ella nærhendis frá sept. til desember 2004. Kann vera møblerað.
Tlf. 313372 ella teldupost: olselsba@hotmail.com

ÍBÚÐ Í BRØNSHØJ
Lítil íbúð í Brønshøj til leigu í tíðarskeiðinum umleið 15. juni til 15. aug. Fyri kr. 200 um dagin. Um onkur kundi hugsa sær at leiga íbúðina fyri alt tíðarskeiði, kunnu vit tosað um prísin. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 28344662/258833

BÝTA UM ÍBÚÐ?
Íbúð í innara KBH ynskist í býti við íbúð mitt í býnum í Tórshavn. Vit eru eitt par ið ætla okkum at vera burtur frá 3. juli og 5 vikur fram. Hevur hetta áhuga, vinarliga ringið
tlf. 316103/218250 ella 225972

ÍBÚÐ
Íbúð ynskist til leigu í Keypmannahavn í døgunum 3.–10. juli 2004.
Tlf. 424714 og 210496

SKRIVSTOVUHØLIR
í miðbýnum til leigu, uml. 150 fermetrar.
Tlf. 315438

GULA HÚSIÐ Í MYKINESI
Eins vælegnað til bólkar sum einstaklingar. Allir hentleikar í húsunum. Nærri við at venda sær til
tlf. 332614/312914/532614

BÝTA UM HÚS Í SUMMAR!
Vit kundu hugsa okkum at hildið 2 vikur frí í aug. helst í Jútlandi. Vit búgva á Hamrinum á Argjum.
Tlf. 215353

SUMMARÍBÚÐ Í KLIPLER
í Sønderjyllandi til leigu, ca. 20 km frá týsku grensuni, 24 km frá Grástenslot, ca. 15 km frá baðistrond. Allir hentleikar, havi at deila við før. vertspar, 1500 kr. um vikuna.
Tlf. 0045 51330286

FRÍTÍÐARHÚS Í NÓLSOY
Slappa av í gomlu Petersen húsinum (nýrenoveraði).
Tlf. 212717/222327

KØMUR TIL LEIGU
Nýggj kømur í Vestmanna til leigu 200 m frá Fiskivinnuskúlanum. Við í leiguni er eitt fult møblerað kamar, internet, ljós og varmi, Felags køk, bað og sjónvarp.
Tlf. 424628

UNG HJÚN SØKJA ÍBÚÐ
í tíðarskeiðinum umleið 15. juni til 15. aug. Fyri kr. 200 um dagin. Um onkur kundi hugsa sær at leiga íbúðina fyri alt tíðarskeiði, kunnu vit tosað um prísin. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 28344662/258833

ÍBÚÐ Í BRØNSHØJ TIL LEIGU
Lítil íbúð í Brønshøj til leigu í tíðarskeiðinum umleið 15. juni til 15. aug. Fyri kr. 200 um dagin. Um onkur kundi hugsa sær at leiga íbúðina fyri alt tíðarskeiði, kunnu vit tosað um prísin. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 28344662/258833

Dýr

SERA FITTUR HUNDAHVØLPUR
3 mør. gamal, mamma retriever og pápin border collie. Barnavinarligur, verður bert latin djóravini. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 514965

TIL SØLU
Sera vøkur 4 ára gomul tilriðin ryssa úr Írlandi. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 533173

TIL SØLU
Undulátar v/ búri til sølu.
Tlf. 456094/756094

TIL SØLU
1 ára gamal Variant hestatransportari til 2 ross.
Tlf. 533173

KETTLINGUR
Eg havi eina sera fitta og reinliga kettu at láta. Hon er svort við hvitari bringu.
Ring 265070 eftir kl. 16

KETTLINGAR
Vegna serligar umstøður verður søknast eftir djóravinarligum heimi til stóran kettling (frensur). Hann er hvítur og gráur og sera fittur og alskin.
Tlf. 421081/508344

DVØRGAPAPAGEYKAR
Uml. 2 mør. gamlir, búr við tilhoyr fylgir við. Virði 2.000 kr. Selist fyri 1.000 kr.
Tlf. 259164

ANGORA KANINUNGAR
til sølu fyri 200 kr. stk.
Tlf. 223858

HEVUR NAKAR SÆÐ
okkara fitta hvíta og gráa frens? Hann er horvin við Villingadalsvegin 28. apríl.
Tlf. 319097/254459

AKVARIUM
óbrúkt, 65 l. til sølu fyri einans 500,-
Tlf. 312915 eftir kl. 18

NAKRIR
dunnuungar til sølu.
Tlf. 441252/261983

DVØRGAHAMSTRARAR
Nakrir dvørgahamstrarar og tvey búr eru til sølu.
Tlf. 721698 og 509630 - Annie

HEY GÓÐU DJÓRAVINIR
er tað ikki onkur, sum vil eiga meg.Eg eri fitt og glað hundatík, eg kann latast nú, um onkur vil hava meg.
tlf. 422175/722175

ER TAÐ NAKAR
ið hevur nakrar fiskar at geva mær? Vinarliga ring
tlf. 455266 ella 268732, Brynja

BORDER COLLIE
hundur verður latin djóravini, er vaccineraður.
Tlf. 455108

2 AKVARIUM
stødd 150 x 50 x 50 til sølu.
Tlf. 375133/575133

EIN FITT REYÐSTRÍPUT KETTA
við reyðum hálsbandi við klokku, er komin at ganga á Rosságøtu á Argjum. Kennist nakar við hana, so ringið
tlf. 310721 ella 215721

KETTLINGUR!
Ein lítil fittur kettlingur verður latin. Hon er svort við hvitari bringu.
Ring 265070 eftir kl. 16

KETTA OG KETTLINGUR
1 ára gomul ketta, sera spøk og reinlig, verður latin vegna ovurviðkvæmi og 1 kettlingur (ketta) 5 vikur gamal, ordiliga fittur, hvítur, eitt sindur myrkur omaná.
Tlf. 447547

KETTLINGAR
Vit eru nakrir sera fittir kettlingar, sum skjótt kunnu latast djóravinum. 2 eru fressar og 2 kettur. Mamma okkara er friðalig, reinlig og von við børn.
Tlf. 371550

EIN SERA FITTUR
kettlingur (ketta) dugir at eta og er reinligur, kann latast beinanvegin.
Tlf. 455108

Fundir

FØROYA FELAG MÓTI KRABBAMEINI
Bót til Bata skipar fyri hugnaløtu fyri kvinnum, sum eru skurðviðgjørdar fyri krabbamein í brósti. Hugnaløtan verður á Hotel Føroyum, týskvøldið 11. mai kl. 19.00. Tekning hjá Føroya Felag Móti Krabbameini,
Tlf. 317959, teldupostur ffk@post.olivant.fo

Húsarhaldstól

TIL SØLU
Fritthangandi eimhetta til sølu.
Tlf. 217118

KØLI/FRYSTISKÁP
Kombinerað køli/frystiskáp til sølu vegna plásstrot. Væl viðfarið. Stødd 1,50x54.
Tlf. 423744/251363

Innbúgv

TIL SØLU
Spildurnýggj 2 manssofa til sølu. Ljóst leður. Nýprísur 2.100,- Nú 1.800 kr.
Tlf. 266306 eftir kl. 14

TIL SØLU
Ein boksmadrassa við toppmadrassu 120 x 200 við boylum undir, sær út sum nýggj, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 310278/508699

TIL SØLU
Sofasett 3+2+1, ungdómsmøblar brúnt floyal/svart træstell 600,- kr. Palisander sofaborð 70 x 130 cm. 600,- kr.
Tlf. 313936 eftir kl. 17

REOLVEGGUR
Palisander reolveggur 2 sekt. skáp og hillar b. 175, h. 175 cm. 1.000 kr.
Tlf. 313936 eftir kl. 17

SJÓNVARPSBORÐ
úr lútaðum træið til sølu fyri einans 300,-
Tlf. 312915 eftir kl. 18

SKRIVARABORÐ
1 stk. skrivaraborð úr lútaðum træið til teldu. Einans 500,-
Ring 312915 eftir kl. 18

MYRKT ANTIK BORÐ
v/ útskornum beinum, til sølu. Mát: 95 b. 125 l. 76 h.
Tlf. 444307

INNBÚGV TIL SØLU
Box song v/ hvítum beinum og galvi 140 x 200. Eik reol, 4 sektiónir v/ útskornum beinum, hillum, skuffum, glasskápi o.a. Mát: l. 1.80 b. 84 d. 43/25.
Tlf. 444307

TVEIR LENISTÓLAR
við fótskamlum og eitt sofaborð úr teak, til sølu fyri kr. 600,-
Telefon 424218

VATNSONG YNSKIST
Fult dempað vatnsong við hita ynskist til keyps.
Tlf. 218796

AVHEINTINGARTILBOÐ!
Komplettur køkur til sølu fyri 6.000 kr. Kølískáp, ovnur, uppvaskimaskina, eymhetta, 5 yvirskáp, ein skuffusektión, 4 undirskáp, 2 høg skáp, borðpláta, vask og krani.
Tlf. 310161

SMÁ BORÐ TIL SØLU
Avsýrað runt 70 cm. dia., 900,-. Hvitt við skuffu 45x70 cm. 700,-.
Tlf. 216778

UNGDÓMSSONG
(daybed) til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 314793

GOTT SOFASETT TIL SØLU
Eitt grønt velour sofasett 3 + 2 verður selt fyri 3000 kr.
Tlf. 318450

MØBLAR TIL SØLU
Ljósir velour møblar 3+2+1 sofaborð, hornaborð og hillasystem bíliga til sølu.
Tlf. 447744

HYGGIÐ HER!
Hornasofa, 2 stólar + skammil og eitt sofaborð bíliga til sølu.
Tlf. 421128 ella 506491

Lutaseðlar

VINNARARNIR Á LUTASEÐLINUM
hjá TB sum vóru drignir á sølustevnuni í Trongisvági 2. mai vóru hesir: 1 vinningur 1109, 2. vinningur 331.
Ringið 371278

MISSIÓNSHÚSIÐ Í HVALBA
Lyklar upp á skutaran fáast til keyps í hesum støðum til 22. mai. Sóljuflóg við Krógv og við Bakkhús. Lyklarnir kunnu roynast leygardagarnar 8., 15. og 22. mai frá kl. 15-17.
Missiónshúsið

Pløgg

BRÚÐARKJÓLI!
Stødd 38, bíliga til sølu.
Ring 313967 ella 312404

KVINNUBÚNI TIL SØLU
Føroyskur kvinnubúni við møttli til sølu. Sum nýggjur, einans brúktur tvær ferðir. Silvurið er hestaskógvur og fyriklæði og turriklæði úr bláum silki.
Tlf. 216532

BRÚÐARKJÓLI
Ráhvítur brúðarkjóli std. 36 til sølu. Slør og tvey undirskjúrt fylgja við.
Ring 268180, Mariann

KLÆÐNINGUR TIL SØLU
Jakki: Large, buksur: w 33/l 34, kann tilpassast. Hvít skjúrta: Large.
Tlf. 268180

TIL MANNFÓLKABÚNAN
Heilt sett av knappum, »Nysølv«, nýtast ongantið at pussast. 46 knappar + stimi fyri 675 kr.
Tlf. 373169/373313

Sjavs

SJAVSKAPPING
verður í Tórsholl týsdagin 11. mai kl. 19.00. Øll eru vælkomin.
Tórshøll

Súkklur

EIN DERBI SENDA R
til sølu. Í sera góðum standi, ring og hoyr nærri.
Tlf. 371618/263265

TVÆR SÚKKLUR TIL SØLU
Dreingjasúkkla 6-8 ár fyri 400 kr. Gentusúkkla 10-12 ár fyri 500 kr.
Tlf. 315081/263925

BANACROSS
Ein KX250 til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 267544

DEILIR YNSKJAST
Deilir til Suzuki K50 4 gear knallert ynskjast bíliga til keyps.
Tlf. 448923/254321

HYGG HER!
18" dreingjasúkkla til sølu. Nýggj, óbrúkt.
Tlf. 316559

GÓÐUR OG BÍLIGUR
skutari ynskist til keyps.
Ring 311263/261033

SÚKKLA
18 gear til sølu fyri 800,-
Tlf. 312915 eftir kl. 18

SÚKKLUHJÁLMAR TIL SØLU
2 súkkluhjálmar til sølu fyri 5,- stk.
Tlf. 312915 eftir kl. 18

2 MOTORSÚKKLUR TIL SØLU
Onnur er ein BMW R80 model 1988 bordeaux reyð. Hevur einans koyrt 2.800 km, sum nýggj. Prísur 100.000 krónur. Hin er ein Veteran Nimbus 1954, koyrt 6.000 km eftir eina heildaristandgerð. Litur: Grøn. Alt er sum nýtt. Prísur: 70.000 kr. Súkklurnar verða seldar orsakað av aldri. Áhugað kunnu ringja
tlf. 0045 21452217 ella 216532 eftir kl. 18

SKUTARI TIL SØLU
Aprilia SR50, árg. 2002, koyrt 3.000 km, prísur 14.000,- v/ hjálmi.
Tlf. 509528

TVÆR KAVASAKI
banacross til sølu, ein 125 ccm og ein 250 ccm, báðar fyri 17.000 kr. 125 ccm koyrir ikki.
Tlf. 218796

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp